# Sir Alex angrar sølu av Rossi

Fyri einum ári síðani seldi Manchester United álopsspælaran Giuseppe Rossi til spanska felagið Villareal, og har hevur Rossi veruliga gjørt vart við seg. Tað hevur fingið United-venjaran Alex Ferguson at umhugsa at keypa Rossi aftur til felagið. - Hann er ein framúr góður spælari, og tað var trupult at lata hann skifta til Villareal. Vit umhugsa at keypa hann aftur nú, sigur Alex Ferguson við News of the World.



# Hoffenheim fremst

Uppflytararnir úr Hoffenheim løgdu seg um vikuskiftið á odda í týsku landskappingini. Liðið úr lítla týska býnum hevur tikið øll á bóli, og leygardagin vunnu teir 3-1 á útivølli ímóti FC Køln. Sigurin hevur við sær, at Hoffenheim hevur lagt seg einsamælt á odda í Bundesliguni . Leverkusen, sum lá á odda, tapti um vikuskiftið og er nú næstfremst.

Neistin-Stjørnan 24-24 (14-14):

# Stjørnur í neistaroki

**Neistin hevði Stjørnuna á krókinum, men tveir misnýttir møguleikar í avgerandi løtunum forðaðu fyri sigrinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað eydnaðist akkurát ikk hjá Neistanum at basa Stjørnuni, tá liðini dystaðust sunnudagin*
*savnsmynd*

VB-sigurin á Stjørnuni fyri viku síðani hevði eisini sínar avleiðingar fyri Neistan. Hesin bar nevnliga við sær, at tær bláu vóru trýstar at fáa stig burtur úr heimadystinum móti meistarunum, um tær ikki skuldu søkka alt ov langt aftur í royndunum at røkka finaluplássinum.

Og við javnleikinum sunnudagin prógvaðu tær bláu, at tær væl kunnu bjóða teimum fremstu av. Tí sigurin hesa ferð var so nær, sum hann kundi vera. Men tveir misnýttir 100% kjansir seinastu minuttirnar forðaðu tó fyri hesum.

### Stine ein sannur fongur

Dysturin var annars enn eitt prógv um, at Stjørnan í løtuni er í einum aldudali. Hóast liðið telur helst bestu bakketuna í landinum, so hevði Neistin fyri tað nógva stórt hepni við at verja rættiliga flatt. Einastu krossini, sum komu frá meistarunum, vóru frá vinstra bakki, og í teimum løtunum, tá Neistaverjan megnaði at lofta renningunum frá Simonu, hevði Stjørnan ikki so øgiliga nógv annað at bjóða uppá.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki gav hetta eisini at bíta, tá 6-8 á máltalvuni varð broytt til 13-10. Fremsta vápnið í hesum var tilgongdin av Stine Mikkelsen, sum sunnudagin spældi sín fyrsta dyst fyri Neistan.

Tað kann væl vera, at Stine bert er 19 ára gomul, men bóltførleikin er á einum støði, sum er sjáldsamur í føroyskum kvinnuhondbólti, og høvdið megnaði støðugt at fylgja við, hóast talan í løtum varð um trýst frá Stjørnuni.

Tí undraði tað eisini, at Stine í rættiliga longum løtum av dystinum slapp at hita beinkin, heldur enn at gera um seg úti á vøllinnum. Variatiónin vantaði í spælinum, tá hon ikki var við í dystinum, og tað gav stjørnuverjuni væl betri arbeiðsumstøður, enn tær annars høvdu.

### Ov nógv á Simonu

Og so skerst ikki burtur, at er lagið tað rætta, so hevur Stjørnan eina bakketu, sum er tann sterkasta í landinum. Og tað var fyrst og fremst hendan, sum dró stigið heim sunnudagin.

Dianne Møller, Durita Ljósstein, Durita Christophersen og Simona Petersen hava allar ta skotstyrkina, sum skal til fyri at hótta mótstøðumálið, og tá tær í løtum fingu glið á, var ikki stórtvegis at gera hjá Fríðu Petersen í Neistamálinum.

Tó var tað merkisvert, at ábyrgdin fyri skothóttanini í so stóran mun er løgd á Simonu Petersen. Eingin ivi er um, at Simona er ein av allar bestu og skotsterkastu spælarunum í landinum. Men við einvíst at spæla upp móti hennara krossum missir álopsspælið stóran part av variatiónini, sum skotstyrkin hjá hinum trimum annars kundi givið.

### Aldudalur

Hóast stigið varð fingið til høldar, so gav dysturin kortini greiðar ábendingar um, at Stjørnan í løtuni er í einum aldudali. Ein aldudalur, sum helst eisini er ein náttúrlig avleiðing av, at liðið støðugt hevur verið ígongd síðani kappingarenda í vár.

Hesa ferð kundu Heidi Maria Akselsen ella Trine Mayland punkterað meistararnar, men báðar misnýttu tær opnar møguleikar í seinastu minuttunum.

Hinvegin er heldur eingin ivi um, at Stjørnan aftur fer at lyfta spælið longur upp. Og fremsta málið er tí at avmarka niðurtúrin, sum tær nú eru partur av.

Neistin hevur hinvegin framvegis sama trýst á sær, tí helst skulu tvey stig á borðið, hvørja ferð tær eru á vøllinum. Næsta ferðin verður um tvær vikur, tá Tjaldur kemur á vitjan, og har kann væl vera, at taparin mest sum er fokin í kapprenningini um at enda á øðrum av fremstu sessunum.

## FAKTA um dystin

**Neistin-Stjørnan 25-25 (14-14)**
**10 min:** 5-5
**20 min:** 10-9
**40 min:** 16-17
**50 min:** 21-19
**Málskjúttar**
**Neistin:** Trine Mayland 8(4), Nicoleta Radu Hansen 4, Stine Mikkelsen 4, Elin Stakksund 3, Rakul Augustinussen 2, Annika Ljósstein 2, Anja Heinadóttir 2
**Stjørnan:** Simona Petersen 11(2), Durita Ljósstein 4, Bára S. Klakstein 4, Dianne Møller 3, Durita Christophersen 1, Anna Kristina Samson 1, Una Olsen 1
**Brotskøst:** Neistin 5, Stjørnan 2
**Útvísingar:** Neistin 3
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

# Skulu finna okkara spæl

Sum fyrireiking til hetta kappingarárið og ikki minst Europa-Cup byrjaðu tær hjá Stjørnuni sínar venjingar, beint sum kappingin var liðug í vár.

Aldudalurin, sum liðið er í í løtuni, kundi bent á, at spælararnir í løtuni er troyttar. Men hetta helt Durita Ljósstein tó ikki, tá vit tosaðu við hana eftir dystin móti Neistanum.

- Nei, men í hondbólti gongur tað alla tíðina upp og niður, og í løtuni hava vit kanska eina lítla downperiodu. Men eg haldi, at vit eru á veg uppaftur. Móti VB vístu vit, at vit kundu koma aftur, hóast vit vóru átta mál aftanfyri, og í dag fáa vit hóast alt javnleikin.

- Hjá okkum ræður bara um at fáa gongd á okkara spæl aftur. Fáa vit tað, so vita vit, at vit hava ein góðan møguleika í seinsta enda.

Og tá vit koma til apríl mánað, so eru tit kanska har, sum tit vilja vera?

- Nei. Har ætla vit okkum at vera longu næsta umfar, og tað fara vit at arbeiða við alt fyri eitt, sigur Durita Ljósstein.

**-mørk**

# Ikki heilt nøgdur

Hóast lið hansara hels spældi besta dystin hetta kappingarárið, so var Neista-venjarin, Svein Rógvi Nielsen, ikki heilt nøgdur við dagin.

- Tú kanst siga bæði og. Tað hevði stóran týdning, at vit ikki taptu, men eitt stig er ikki nokk. Hinvegin er okkara spæl gott í dag, og vit vísa tað, sum vit ikki hava gjørt hinar dystirnar. At vit so ikki klára at halda, hóast vit eru trý mál frammanfyri, tá fimm minuttir eru eftir, er kanska gummiarmar.

Og so slapp Svein Rógvi heldur ikki undan at rósa Stine Mikkelsen, sum spældi sín fyrsta dyst fyri Neistan.

- Hon spældi ein super góðan dyst, og tað er gleðiligt. Og ikki minst er tað gleðiligt, at liðið sýnir so stóra breidd, sum vit gera í dag. Nú ræður so um hjá okkum at fanga hini aftur, tí vit vilja sjálvandi vera fremst, tá árið endar, sigur Svein Rógvi Nielsen.

**-mørk**